


www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 09 - 2012

# ONS stjórin rósar føroyingum

"Nú skal tað vera - hesaferð fer tað at eydnast hjá tykkum at finna olju ella gass", sigur ein brosandi ONS stjóri, tá hann vitjar føroyska básin á oljumessuni í Stavanger. Vinarbýir Hann var borgarstjóri í Stavanger í fleiri skeið. Nú stendur hann á odda fyri oljumessuni ONS, og hann hevur alla orsøk til at vera nøgdur. Vitjanin á oljumessuni í ár hevur sett met. Meira enn 60.000 fólk hava vitjað teir umleið 1300 básarnar, teirra millum tann føroyska. Og Føroyar eiga eitt serstakt pláss í hjartanum hjá Leif Johan Sevland. Stavanger og Tórshavn hava verið vinarbýir leingi, og sum borgarstjóri hevur hann tí havt tætt tilknýti til Havnina og Føroyar. Tað var tí eisini ein sera hugaligur stjóri, sum vitjaði føroyska básin, áðrenn dyrnar lótu aftur fríggjadagin. Og hann dylur ikki fyri, at hann er sera errin av føroysku luttøkuni. Ovfarin Eg eri ovfarin av føroysku luttøkuni her á ONS. Tit hava verið við leingi. Tit arbeiða miðvíst og uppá longri sikt og eru sera vitandi um, hvussu tit byggja upp netverk og vitja pláss í heiminum, sum hava verið í somu støðu sum tit. Tit eru við at byggja upp eina vinnu á økinum, og tað er gott. Føroyar eru væl fyrireikaðar til eina komandi oljuvinnu, sigur Leif Johan Sevland við oljan.fo Vónandi eydnast tað tykkum at finna olju hesaferð, so tit kunnu vera við á ONS næstu ferð sum oljutjóð. Myndir Fyrrverandi borgarstjórin og nú stjóri fyri ONS, Leif Sevland vitjar føroyska básin. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller